ítróttur

Nr. 205 • mikudagur • 27. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Símun skal spæla við ÍF

Fuglfirðingurin, sum tey bæði seinastu árini hevur vunnið FM við HB, skal næsta kappingarár spæla við barndómsfelagnum

ÍF FYRIREIKINGAR
Jóannes Hansen



Fuglfirðingar brynja seg av álvara til nýggja kappingarárið. Í síðstu viku varð tað alment, at Petur Simonsen næsta ár skal venja felagið, sum hann áður bæði hevur verið formaður í og venjari hjá. Týskvøldið skuldi fundur vera í Fuglafirði, har venjarin ætlaðist at leggja sínar ætlanir fyri nýggja kappingarárið fyri spælararnar.

Millum spælararnar hjá ÍF næsta ár verður Símun Eliasen. Hann hevur tvey tey seinastu árini verið ein av berandi kreftunum á HB liðnum, sum hevur vunnið meistaraskapin. Sambært HB heimasíðuni hevur Símun ætlanir um at fara at byggja, og tað fer at hava við sær, at hann ikki fer at hava umstøður at venja so nógv, sum tað verður kravt, at HB spælararnir skulu venja. Sambært HB heimasíðuni fer tað at bera Símuni til at venja minni enn so og kortini at spæla við ÍF. HB heimasíðan veit eisini at siga, at tað er eitt gamalt ynski hjá Símuni aftur at spæla við barndómsfelagnum.

Símun Eliasen verður 24. november 30 ár. Símun hevur ikki spælt við ÍF síðani í 2001. Tá spældi ÍF í 2. deild, og Símun var á liðnum í tveimum dystum, og hann skoraði tvey mál. Hetta var, meðan hann var heima í summarfrí frá útbúgving í Danmark.

Tá ið Símun í síni tíð spældi í Fuglafirði, varð hann málsøkin miðvallari. Tey bæði árini, sum hann hevur spælt í HB, hevur hann verið fastur fúsur í miðverjuni. Í 1996 spældi Símun tvær ferðir á landsliðnum. Tíðliga í vár var hann á venjingarlegu við landsliðnum, men síðani hava tað ikki verið landsliðsboð eftir honum. Í 1996 varð roknað við, at Símun skuldi spæla fleiri ferðir á landsliðnum, men ein herviligur skaði um sama mundið, sum hann var um at vinna sær pláss á besta AGF liðnum, hevði við sær, at hann ikki fekk spælt fótbólt í eitt langt skifti.

Í síðstu viku søgdu fuglfirðingar, at teir arbeiddu við at fáa tveir góðar spælarar at styrkja um liðið. Nú er annar komin, men enn hevur einki verið at frætt um, hvør hin spælarin fer at verða.

Leggja fyri við at tiga

Tá ið áttandapartsfinalurnar í donsku steypakappingini verða spældar í kvøld, verður tað í Parkini lagt fyri við tøgn og svørtum syrgibondum

DANSKA STEYPAKAPPINGIN
Jóannes Hansen

Í kvøld eru átta dystir á skránni í donsku steypakappingini. Tað, sum er farið av hesi vikuni, hevur danski fótbóltsheimurin fyrst og fremst verið upptikin av syndarligu vanlukkuni í Parkini sunnudagin, sum kostaði einum 24 ára gomlum FCK viðhaldsmanni lívið.

Í kvøld fer FCK í áttandapartsfinaluni at spæla á heimavølli móti OB. Tað er avrátt, at tað undan dystarbyrjan skal verða tøgn í ein minutt, og at spælararnir skulu hava svart bind um armin. Hetta verður gjørt fyri at minnast unga mannin, sum doyði sunnukvøldið. Síðani mánadagin eru ein rúgva av blómum lagdar uttanfyri Parkina. Hesar verða í kvøld fluttar inn á áskoðaraplássini, har eitt økið er avgirt, og har tað í kvøld fer at bera til at leggja heilsanir.

Trý onnur føroysk feløg í Danmark skulu í kvøld spæla í steypakappingini. Frem, sum hvørja ferð hevur Jón Róa Jacobsen millum teir fyrstu ellivu og Gunnar Nielsen á beinkinum sum eykamálverja, AC Horsens, sum hevur Johan Byrial Hansen í verjuni, og Fremad Amager, sum hevur Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum í hópinum. Jann Ingi Petersen er framvegis ikki komin fyri seg eftir óhepna eygnaskaðan.

Frem skal spæla á heimavølli móti Skjold. Hesi bæði feløgini skulu í vikuskiftinum spæla landskappingardyst. Horsens skal spæla á heimavølli móti AaB, og Fremad Amager fer at fáa vitjan av FC Nordsjælland.

Hinir fýra dystirnir eru hesir: Ølstykke-SønderjyskE, Køge-AGF, Herfølge-FCM og Esbjerg-Brøndby.

Fjórðingsfinalurnar skulu sambært skránni spælast mikudagin 10. november.

Verður helst til samanlegging

Fyri fyrst ferð besta mansliðið tó at eita VB, og liðið í aðru deild Sumba. Men frá 2006 verður talan endaliga um VB/-Sumba

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at hava roynt eina samanlegging nøkur í ár í 90'unum, fóru VB og Sumba ta ferðina hvør til sítt. Nú tykist tó, sum um partarnir eru til reiðar at leggja ta hendingina aftur um bak, tí enn einaferð eru samráðingar um eina samanlegging ígongd.

Tosið hevur ljóðað eina tíð, og mánadagin kundi VB so lýsa til limafund, har samanleggingin var einasta mál á skránni. Sum skilst, so var fundurin ógvuliga positivt sinnaður mótvegis eini samanlegging, og týskvøldið vóru tað so limirnir í Sumba, sum skuldu spyrjast eftir.

Í Sumba er tað mest Torri Thomsen, sum hevur havt við málið at gera, og hann dylir ikki fyri, at tey í Sumba sígja seg noydd til at taka slík stig.

– Soleiðis sum krøvini eru blivin, so síggi eg ikki aðrar møguleikar, um Sumba skal yvirliva. Og eg vil eisini leggja dent á, at hóast talan verður um samanlegging, so fer Sumbiar Ítróttarfelag ikki í søguna. Tað verður framvegis aktivt, men á fótbóltssíðuni verður talan um ein yvirbygning saman við VB, staðfestir hann.

Nøvnini varðveitast

Fyrsta árið verður tó ikki serliga sjónligt, at talan verður um eina nýggja samanlegging. VB fyllir tá 100 ár, og Sumba 65 ár, og tí eru nevndirnar komnar ásamt um, at nøvnini ikki verða broytt alt fyri eitt. Soleiðis kemur liðið í fyrstu deild at VB og í aðru deild Sumba í 2005. Hinar deildirnar koma tó at bera felagsheitið, og tað verður so galdandi fyri øll lið felagsins í 2006.

Eisini er ætlanin, at hondbólturin í Vági verður tikin við í nýggja yvirbygningin. Ikkk so nógv tí sumbingar hava nakra serliga siðvenju innan hetta økið, men einamest soleiðis at felagið ikki kemur at kappast við hondbóltin, men heldur kemur at samstarva við hesi.

Teitur ljómar í útvarpi í USA

Ein føroyskur sjómaður gjørdist bilsin og fegin, tá hann tvær ferðir innan fáar tímar hoyrdi Teit Lassen í útvarpinum í Florida á tveimum ymsum útvarpsstøðum

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Ábendingar eru um, at Teitur Lassen veruliga er um at fáa fótin fastan sum tónleikari í USA. Ein føroyskur sjómaður, Andras Jóanesarson, sigur soleiðis:

– Tann 10. oktober 2004, fór eg spákandi úr flogfarinum, sum eg varð komin við úr Washington, inn í komuhøllina í altjóða lufthavnini í Tampa, Florida, USA. Meðan eg og gongan av ferðafólki ganga móti viðførisbandinum, streymar tónleikur úr hátalarunum. Tá er tað at eg blívi ikki sørt kløkkur og glaður og alt í senn, tí brádliga hoyrist lagið "Poetry and Aeroplanes" hjá Teiti Lassen. Eg mátti steðga á undir einum hátalara og hoyra lagið liðugt.

Men bilsni hjá langt av landi skotna føroyinginum steðgaði ikki har. Tí enn ein uppliving bíðaði honum fáar tímar seinni.

– Um kvøldið, tá eg varð komin á hotellið, har eg skuldi verða um náttina, fór eg niður á matstovuna at fáa mær ein bita. À matstovuni spæla tey eisini tónleik og mín sann um ikki lagið hjá Teiti Lassen, "Poetry and Aeroplanes", eisini verður spælt har, greiðir Andras frá.

Niðurstøðan hjá føroyinginum í stóra landinum "over there" er greið.

– Tann 10. oktober hoyrdi eg innanfyri nakrar tímar, tvær ferðir lagið "Poetry and Aeroplanes" hjá Teiti Lassen á tveimum ymiskum støðum í Tampa, Florida, USA. Tad er fantastikt, haldi eg. Takk fyri upplivilsi, Teitur, sigur Andras Jóanesarson.

Hervið kann enn einaferð staðfestast, at tað gongur framá hjá Teiti Lassen í strembanini eftir at fáa tónleikaligt gjøgnumbrot á altjóða tónleikapallinum.

Havnar Bóltfelag takkar hervið øllum

fyri heilsanir og gávur á 100 ára degnum.

Eisini ein tøkk til tey mongu,

sum hjálptu so væl til,

at føðingardagurin varð so minniligur.

Við fótbóltskvøðu

HAVNAR BÓLTFELAG 100 1904 2004

HAVNAR BÓLTFELAG

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

KAJ

Ein dokumentarisk ævisøga

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Forlagið Hellurnar
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard · Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík
Tel. 22 31 43 · justinus@post.olivant.fo

FØROYAPRENT · TEL. 314 555